Til Rættarnevndina

Húsalánsgrunnurin hevur sambært lógaruppskotinum ikki heimild at krevja leigu frá Sjúkraflutningstænastuni. Viðurskiftini viðvíkjandi nýtslurættinum verða sambært lógaruppskotinum avtalað millum Heilsumálaráðið og Umhvørvismálaráðið. Ætlanin er ikki, at Sjúkraflutningstænastan skal rinda leigugjald fyri nýtslurættin.

Sambært § 1, stk. 2 hevur Heilsumálaráðið nýtslurætt til niðastu hædd í bygninginum Eirargaður 2 umframt lága bygninginum niðan ímóti Frælsinum.

Ætlanin er, at hildið verður fram við verandi skipan, har Sjúkraflutningstænastan ber kostnaðin av rakstrarútreiðslum, ið einans viðvíkja henni, so sum kontórútbúnaður v.m., ella um Sjúkraflutningstænastan ynskir at gera smærri ábøtur á hølini í niðastu hædd. Heilsumálaráðið / Sjúkraflutningstænastan rindar somuleiðis fyri sín lut av felagsútreiðslum so sum el, hita v.m. sambært avtalu, sum skal gerast millum Heilsumálaráðið og Umhvørvismálaráðið. Sjúkraflutningstænastan skal ikki rinda leigugjald fyri nýtslurættin.

Vinaliga / Kind Regards

Pól E. Egholm

Aðalstjóri

Umhvørvismálaráðið / Ministry of Environment

Mob +298 556076